


*Ivan Hansen, eigari av Nordisk Håndskomageri & Design, og dótturin Helene Stjernholm*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Móttøka og fernisering



DESIGN

*Helene Stjernholm designari og Janus D. Guttesen teknari*

**Magnus Gunnarsson**

Fríggjadagin 9. juli verður móttøka og fernisering hjá Nordisk Håndskomageri & Design í Sjúrðargøtu 10 í Havn, har Helene Stjernholm designari og Janus D.Guttesen teknari sýna fram.

Helene Stjernholm designar skógvar og sýnir fram sínar tekningar og nýggjar skógvar, sum hon hevur designað.

Janus D. Guttesen hevur fernisering av seks tekningum, ið síggja út sum sonevnd koparstikk í gomlum stíli. Tekningarnar vísa hvussu skógvar hava verið gjørdir og umvældir frá miðøld og til okkara dagar. Tekningarnar eru í A3 stødd og skulu hanga sum prýði á skómakaraverkstaðnum.

Móttøkan og ferniseringin verður 9. juli frá kl. 15-17.30.

*maggi@sosialurin.fo*



TIL STROKS

*Eini 15 fólk tóku lut í miðnáttarrenningini í fjør*

# Miðnáttarrenning út á Borðuna

**RENNING** Í fjør var ein roynd gjørd at skipa fyri sonevndari miðnáttarrenning út á Borðuna í Nólsoy og tað hepnaðist so væl, at tátturin er tikin upp aftur í ár

**Leo Poulsen**

Tað var Kunningarstovan í Nólsoy, sum tók stig til eitt rennitiltak í fjør, har luttakararnir byrjaði renningina í bygdini, runnu út á Borðuna og heim aftur.

Einir 12-15 fólk høvdu meldað seg til, og tiltakið hepnaðist so mikið væl, at tátturin verður tikin upp aftur í ár.

- Nú hendi tað óhapp í fjør, at ein av luttakarunum var so óheppin at bróta beinið suðuri á Borðuni, og tað merkti sjálvandi tiltakið. Hinvegin hepnaðist so væl í allar aðrar mátar, at vit skipa fyri líknandi renning aftur í ár, sigur Katrina í Geil, ið er ein av fyrireikarunum.

Rennararnir savnast í Kunningarstovuni klokkan 22.30 eftir at Ternan er komin úr Havn, og síðani verður runnið haðani út á Borðuna og heim aftur.

Tveir vandir marathonrennarar, báðir nólsoyingar, verða við, bæði sum luttakarar, men eisini sum ferðaleiðarar. Samlaði teinurin út á Borðuna og aftur er um 20 kilometrar.

- Heimaftur komin ber til at fáa sær brúsubað og ein góðan bita við føroyskum viðskera, áðrenn farið verður aftur til Havnar við báti, sigur Katrina í Geil.

Hon sigur, at sjálvandi eru onnur enn rennarar eisini vælkomin út til Nólsoyar fríggjadagin at njóta oynna og náttúruna á náttartíð.

- Kunningarstovan verður opin, meðan runnið verður, so ongum nýtist at vera úti alla tíðina, sigur Katrina í Geil.

Renningin verður sum nevnt nú fríggjadagin, og tey, ið hava hug at verða við, verða biðin um at boða frá á Kunningarstovuni, telefon 327060, innan klokkan 17 í morgin.

*leo@sosialurin.fo*